# EG HAVI EITT »ORSAKA EG ERI TIL« SYNDROM

**SAMRØÐA** - Tá tað er undanvindur, hevur man lyndi til at sláa bremsurnar í, tí man óttast, at í morgin er lotið dovna. Kanska torir man bara ikki at trúgva uppá, at tað knappliga fer at ganga so øgiliga gott, sigur Jóanes Nielsen. Vit tosa við rithøvundan um dreymar, bókmentir, ummælarar, trúboðan og annað

Sissal Kampmann

Frá 5 – 8 mai, var tiltakið Cph. litt., Copehagen litterature festival hildið á triðja sinni í Keypmannahavn. Føroyar vóru umboðaðar av rithøvundanum Jóanesi Nielsen og av filmslistakvinnuni, Katrini Ottarsdóttir.

Tað var upplagt, at júst tey bæði umboðaðu Føroyar. Jóanes er nýliga umsettur til danskt, eftir ein fimtan ára langan støðg, og eisini av tí, at hann fyri stuttum var avmyndaður í filminum hjá Katrini, Sporini vaksa úr orðum, sum var frumframførdur í Føroyum og í Danmark fyrst í árinum. Filmurin hjá Katrini er ein mynd av rithøvundinum, kommunistinum og erkaføroyinginum, Jóanes Nielsen, ið er føddur í Tórshavn í 1953. Filmurin er ein roynd hjá filmsskaparanum at lýsa yrkjaran, ið hevur orðið so vælsignað í sínum valdi. - At fara afturum facaduna og at kanna tær mekanismur, ið dríva mannin til at skapa.

Jóanes verður av Oddfríða Marner Rasmussen kallaður Føroya tjóðarskald. Eitt heiti, ið ikki er heilt skeivt, tí Jóanes er bæði heima og uttanlands ein ótrúliga vælumtóktur og virdur høvundi, bæði innan skaldsøgu - og yrkingagenruna. Hetta hóast evnini hann viðger í skaldsøgum, leikum og yrkingum, skera sum rakibløð. - Evnini eru politisk-eksistentiel og ítaluseta tað, vit helst ikki vilja síggja, hoyra ella vita um.

Jóanes kallar seg føroyskan sjómann, fiskara og arbeiðsmann og haravtrat yrkjara síðan 1978. Skaldskapurin hjá honum verður ofta lýstur sum beinleiðis og ráur, men samstundis sum sera vakur, romantiskur, lítiðlátin, rørandi og ektaður. Jóanes er tann føroyingurin, ið oftast er innstillaður til Nordisk Råds Litteraturpris. Fýra ferðir í alt, seinast í 2004 fyri yrkingasavnið, Brúgvar av svongum orðum.

## Hugtikin

Tað eru ikki bert føroyingar, ið eru hugtiknir av verkunum hjá Jóanesi Nielsen.

Í blaðnum, Bogmagasinet, sum forlagið Arnold Busk gevur út, skrivar Flemming Andersen m.a. í greinini, Fjeldene brænder, at ein av teim bestu nútímans føroysku rithøvundunum er Jóanes Nielsen. Hin er Tóroddur Poulsen (1957). At tað eru menn sum teir, ið lyfta arvin eftir Williami Heinesen, og at teir gera tað við bravour. Í mun til Tórodd, hevur Jóanes Nielsen ikki verið umsettur til danskt seinastu tíggju árini. Ikki fyrr enn nýliga byrjaða forlagið Tórgarð, ið Hugin Eide rekur, tók yvir, har forlagið Vindrose slepti fyri góðum fimtan árum síðan, og umsetti og gav út skaldsøguna Glansbilætasamlararnir í 2008 og yrkingasavnið Brúgvar av svongum orðum í 2010, hevur danski lesarin aftur haft møguleika at lesa verk eftir Jóanesi. Hetta hevur sambært Andersen verið nakað hann hevur glett seg til leingi, og hann kallar verkini hjá Jóanesi smá meistaraverk í norðurlendskum bókmentum, - eisini tá sammett verður við teir stórstu rithøvundarnar. Hann skrivar, at verkini halda á einum altjóða støði, og at tey uttan trupulleikar kunnu lesast av einum lesara, ið aldri hevur sett síni bein á føroyska jørð. Við øðrum orðum: Verkini hjá Jóanesi vera av Andersen mett at vera eksistentiel á einum alheims støði, og eru nógv meir enn heimstaðarbókmentir, meir enn endurminningar til føroyingar og til fólk við tilknýti til landið.

Á bókmentafestivalinum var Jóanes á skránni fýra ferðir: Fríggjakvøldið 7 mai las hann upp á Kgl. Bókasavninum, svarta gimsteininum, saman við donsku rithøvundunum, Ursulu Andkjær Olsen og Piu Tafdrup. Seinni sama kvøldið var hann á palli í samrøðu saman við íslendska rithøvundanum, Einari Már Guðmundssyni. Leygarmorgunin var filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir um Jóanes sýndur í Grand Teatret mitt í Keypmannahavn. Eftir filmin var samrøða við Jóanes og Katrina, har Tore Leifer frá kulturnyt á P1/Dr, var moderator. Jóanes endaði sína turné í Keypmannahavn í samrøðu við Jens Kodal í Húsinum á Magstræde. Eftir filmin í Grand, legði Tore Leifer út við at siga frá, at Jóanes var føddur sama ár sum Stalin doyði, eitt ár eftir Einar Már Gudmundsson og tvey ár fyri íslendska høvundan, Eirik Kárason. – Leifer segði m.a, at hann persónliga metti, at hetta var størsta ættarliðið av norðurlendskum høvundum.

Spurdur, hvat Jónanes heldur um hetta svarar hann, at tað hann metir, teir hava í felag, er tónleikurin, ið kom við Rolling Stones og Beatles.

- Eg kendi sjálvsagt verkini hjá teimum, men annars havi eg ikki havt nakað samband við teir. - Eg helt altíð, at Einar Már og teir høvdu stykni til tí politisku rørsluna eg hoyrdi til, men eg síggji nú, at Einar Már hevur yvirhála tey flestu í sínum ættaliði við nýggjastu kraftfullu politisku bókini hjá sær, Hvíta bókin. Eg síggji eisini líkheitir millum skaldsøguna hjá Einari Már, Alheimsins einglar og leikin hjá mær, Eitur nakað land weekend?, ið bæði snúgva seg um sálarliga sjúk. - Mínar fyrimyndir innan skaldsøgur eru eldri, enn mínir norðurlendsku javnaldrar. Tað eru flottir fýrar sum Dostojevski og yvirhøvur høvundar, ið livdu fyri hundrað til hálvtannaðhundrað árum síðani. – Sjálvsagt eisini teir nýggju eksistentialistisku høvundarnir, og ikki minst teir, sum sprottu úr kommunisktisku rørsluni. Á ein hátt eru tað høvundar frá tveimum og trimum ættarliðum síðan, ið hava kveikt meg mest. - Ikki minst surrealistarnir, eftir teir vóru komnir yvir barnasjúkurnar sum automatskriftina osfr.

***Nú eru tínar bøkur aftur at lesa á donskum, og filmurin hjá Katrin um teg hevur fingið góða og nógva umrøðu. Hvønn týdning hevur hetta fyri teg?***

- Eg havi avgjørt fingið góð skoðsmál. Tey, ið dáma filmin koma yvir og siga tað við meg, men fólk hava ikki slitið trappurnar hjá okkum fyri at siga, at tey halda at hetta er eitt framúr verk. - Men tað er soleiðis tað er, tá tú fæst við list í Føroyum. Tað er so avmarkað, og tú fært ikki tey nógvu ummælini í miðlunum. Høvuðsparturin av ummælunum tú fært, eru tey tú fært frá fólki tú møtir á gøtuni, í veitslu ella tilvildarliga. Á henda hátt virkar eitt slag av underground ummælara - og kritikaravirksemi í Føroyum. - Ein fílist ofta á, at ummælarar eru so fáir og